Vælkomin til dyst í Fløtugerði

# ÍF – EB Streymur

sunnudagur 9. august 2015




Minst til limagjaldið!
Sí http://www.if.fo

Mynd: Norðlýsið

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
*ábyrgdarblaðstjóri*



## Vælkomin til Effodyst í Fløtugerði í Fuglafirði

Í dag taka vit ímóti EB/Streymi, sum hevur havt eitt sera tungt kappingarár, har teir liggja niðast á stigatalvuni, so um teir skulu megna at halda sær uppi í deildini, so skulu teir í gongd við at fáa stig, og eru teir fullgreiðir yvir hetta. Lið í trongum skóm vísa ofta at tað ber til, so teir koma heilt sikkurt at geva alt, sum teir hava.

Okkara menn hava havt tað strævið tveir teir seinastu dystirnar, á útivølli á Ólavsøku móti B36 taptu vit 4-0 og mánakvøldið tók NSÍ ímóti okkum og sendi okkum heim aftur við úrslitinum 5-1, hetta vísir at okkara lið manglar moral og stríðsviljan, sum vit hava dúva uppá seinastu árini, fólk eru skjót at peika eftir feilum, men tað er ikki altíð eitt einfalt svar. Okkara venjari er farin í gongd við uppbyggjandi arbeiði, tí støðan var ikki góð aftaná kappingarárið í fjør, og sær tað viðhvørt út til at byrja at hanga saman við spæli og hugburði, men úrslitini eru ikki komin enn. Frustratiónir vísa seg eisini at koma sníkjandi nú, vegna væntandi úrtøku, men nú ræður um at halda fast og standa saman um liðið. Vit mugu eisini minnast til at tveir útidystir móti vælkoyrandi oddaliðum ikki eru tespiligir at koma í gongd við. Vit mugu hyggja frameftir og vóna at vit fáa tingini at detta okkara veg restina av kappingarárinum, soleiðis at vit byggja víðari næsta ár, tí í ár verður neyvan nakað Europapláss at spæla um hjá okkum, men meira tað at halda seg frá niðurflytingarstrikuni.

Mótstøðuliðið í dag fekk eisini av at vita seinasta umfar, tá AB við sínum fyrsta sigri í ár, vann 4-0.

So tað er lagt upp til ein spennandi dyst, har bæði liðini vilja sleppa at vaska eitt stórt tap av sær. Og kann ÍF við einum sigri halda seg frá niðurflytingarstríðnum, og hjá EB/Streymi er við at vera seinasta útkall, so her er nógv uppá spæl í dag.

*Koyrið á dreingir.*
*Góðan dyst øll somul*

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Fyrr í ár gekk tað soleiðis:** | | | |
| 3 | 14-03-2015 | EB/S- ÍF | 2-2 |
| 11 | 14-05-2015 | EB/S-ÍF | 0-3 |
| **Í 2014 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 5 | 17-04-2014 | ÍF-EB/S | 3-0 |
| 13 | 15-06-2014 | EB/S-ÍF | 1-2 |
| 26 | 19-10-2014 | ÍF-EB/S | 0-2 |
| **Í 2013 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 2 | 16-03-2013 | EB/S-ÍF | 1-2 |
| 11 | 24-05-2013 | ÍF-EB/S | 2-2 |
| 22 | 15-09-2013 | EB/S-ÍF | 5-0 |
| **Og í 2012 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 7 | 05-05-2012 | ÍF-EB/S | 1-2 |
| 12 | 13-06-2012 | EB/S-ÍF | 2-1 |
| 21 | 29-08-2012 | ÍF-EB/S | 1-1 |

**ÍF FÓTBÓLTUR**
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

**LEIKSKRÁIN:**
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: NiNG - Tel 215 315



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# TIPPIKAPPING

Sum nakað nýtt, so fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á leikaranum, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| TB | KÍ | | | | |
| EB/Streymur | B36 | | | | |
| HB | AB | | | | |
| NSÍ | FC Suðuroy | | | | |
| Víkingur | ÍF | | | | |

Navn:

Telefonnummar


NORÐOYA SPARIKASSI

Saman finna vit bestu loysnina
- Vælkomin til eitt kundaprát í sparikassanum

Ynskir tú at hoyra nærri um hvørjar tænastur vit kunnu bjóða tær. Alt frá barnasamansparing, billáni, bústaðarláni, pensjónssamansparing og aðrar fíggjarmøguleikar ella kanska vegleiðing til at nýta netbankan, ert tú vælkomin til eitt kundaprát í sparikassanum




Bílegg eitt kundaprát á tel. 47 5000

Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 47 5000 Fax 47 6000 ns@ns.fo www.ns.fo





fk

Fuglafjarðar Keypssamtøka

tel 660020
fax 444895 | far 217095

Opið er mánadag - leygardag frá kl. 9 - 22
Sunnudag er stongt!

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar



Linde Gas ] AGA

# FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

**Opnigstíðir:**
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**







**Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.**

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**

# TIPS 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Fimm teir fyrstu spurningarnir eru um viðkomandi leikara, ið verður spurdur, í meðan teir írestandi átta, eru vanligir fótbótlsspurningar. Í teimum fyrstu 5 spurningunum fær leikarin hálvt minusstig, um hann ikki hevur rætt svar. Annars telur rætt svar 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum og skal taparin, so senda víðari til næsta mann/kvinnu í røðini.

Martin vann á Áka seinast, sum sendi heiðurin til Andy. Martin og Andy fingu møguleikan at vedda, og teir settu nakrar pinnar, sum eru blankir í toppinum uppá spæl. Eftir 3 sigrar á rað, vísti Andy seg at verða ov sterk mótstøða til Martin. Andy vann 8,5-7, sum so merkir, at Martin skal senda víðari. Martin valdi ein fyrrverandi liðfelaga í Eyðun Ryggshamar, sum kemur at dystast móti Andy, tá HB kemur á vitjan í 22. umfari. Samlaða støðan er nú 6-4 til fjepparanar, so Andy kann enn gera eitt hál, og fáa samlaða sigurin til leikararnar.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | ÁÓO | MMH |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1T | Í móti hvørjum spældi Andy sín fyrsta dyst fyri ÍF? | B68 | Víkingi | Skála | 1 | 1 |
| 2 | Í móti hvørjum fekk Andy sín fyrsta sigur fyri ÍF? | Víkingi | B36 | HB | 1 | 1 |
| 3 | Hvussu ofta hevur Andy skotið tvey ella fleiri mál í sama dysti fyri ÍF? | Ongantíð | Eina ferð | Tvær ferð | 1 | 0 |
| 4 | Hvussu nógv mál hevur Andy skotið móti B68, tá hann hevur umboðað ÍF? | 5 | 7 | 9 | 1 | 0 |
| 5 | Hvussu nógv kort hevur Andy fingið fyri ÍF? | 7 | 9 | 11 | -0.5 | 0 |
| 6 | Beiggi til ein heimskendan leikara hevur júst skrivað sáttmála við skotska felagið Partick Thistle. Hvør er kendi leikarin? | Didier Drogba | Patrice Evra | Paul Pogba | 1 | 1 |
| 7 | Hvør er fjórða val, tá Barcelona skal seta sítt liðskiparaband? | Gerard Piqué | Javier Mascherano | Sergio Busquets | 1 | 0 |
| 8 | Hvussu eitur heimavøllurin hjá Watford? | Vicarage Road | Pride Park | Dean Court | 1 | 1 |
| 9 | Hvussu eitur fótbóltsfilmurin, sum hevði m.a. Pelé, Osvaldo Ardiles, Bobby Moore og Sylvester Stallone sjónleikaralistanum? | Glory | Freedom | Victory | 1 | 1 |
| 10 | Hvør er formaður í fótbóltsnevndini hjá TB? | Jón Johannesen | Óli Johannesen | Kim Roest | 1 | 0 |
| 11 | Hvussu nógvar dystir er Margar Hansen skrásettur fyri í øllum kappingum? | 66 | 76 | 86 | 0 | 1 |
| 12 | Hvat er síðsta kvinnulið, sum ikki er KÍ, ið hevur vunnið fremstu kvinnudeildina? | B36 | HB | VB | 0 | 0 |
| 13 | Hvat íslendskt felag umboðaði fyrrverandi Manchester United leikarin Lee Sharpe? | Dalvík | Grindavík | Njarðvík | 0 | 1 |
| | Tilsamans | | | | 8.5 | 7 |

Rætt svar: 2 - x - 1 - 1 - x - 2 - x - 1 - 2 - 1 - 2 - x - x





KJ HYDRAULIK veitir
· Tvíkiljur
· Aliringar
· Alibesløg
· Iveco motorar
· Palfinger sjókranar
· Kapstanar og spøl
· og mang annað
Fjølbroyttur veitari til vinnuna
KJ HYDRAULIK er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastu til alivinnuna, skipaflotan, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.
PALFINGER
PALFINGER MARINE
HYUNDAI
Set teg í samband við okkum í Havn ella á Kambsdali, ring 40 70 00
KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL
Kambsdalur: Postsmoga 110 / Tórshavn: Mykinesgøta 5 · Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01 · info@kj.fo · www.kj.fo


Restaurant
Muntra
STUÐLAÐ ÍTRÓTTINUM
OG MENTANARLÍVINUM Í
FUGLAFIRÐI SÍÐAN 1972
FO-530 FUGLAFJØRÐUR
TLF. 444081 · 444039
FAX 444954 · FAROE ISLANDS


Vit gera
- vegir
- gongubreytir
- tún
- parkeringsøkir o.a.
Vit planera
og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

# Leikarin í dag:




ıavn: .......................................... Bartal Eliasen
ıðingardagur: .......................... 23-08-1976
ıðistað: ...................................... Tórshavn
ıarv: .......................................... Lærari
ıss á vøllinum: ......................... Verjuleikari
virtrúgv: .................................... Onga
orð sum lýsa teg: ..................... Tvørur - viljasterkur - engageradur
ırførasti mótstøðumaður: ....... Lukasz Cieslewicz
ıtíðaritriv: ................................. Flogbóltur og fisking
ónir fyri 2015: ......................... Uha, sum árið hevir útvikla seg, má nokk vera verandi í deildini

# ín Ítrótt:

**ırsti dystur á 1.liðið:** uha einaferð fyri 23 árum síðani
**ær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Havi nokk verið eini 6 ára gamal
**ðrar ítróttargreinar:** Flogbóltur
**ınningarríkasti dystur:** Má nokk vera tá eg setti fótin á bóltin til 3-1 móti Víkingi og ÍF fór í Europa
**ørstu fótbóltsliga ávirkan:** Bróður
**ısti fótbóltsleikari:** Zinedin Zidane
**m ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Flogbólt
**vat slag av venjing dámar tær best:** Interval
**vat slag av venjing dámar tær ikki:** Renning

# ínir favorittar:

**ıatur og drekka:** allur føroyskur mætur saman við eini kaldari
**ıag av tónleiki:** Allur, men nokk mest Queen
**ıónvarpssending:** ak nú er tað Arrow
**t slappa av:** Fari ein túr við tráðuni
**ıoyggja nr.:** 76
**ısti fótbóltsleikari nakrantíð:** Zinedine Zidane
**ıónvarp/filmstjørna:** Har er fleiri, ein kundi verið Anthony Hopkins ella Robert de Niro
**ısta bók/blað:** The Da Vinci Code
**ıuttligasti persónur:** Vinmennirnir
**ıuttligasti í ÍF hópinum:** Fritti ella hatta uppi hjá Helle
**ısti ÍF áskoðari:** Jógvan

# eikarafakta:

Av metum, ið vit hava haldgóð hagtøl av, situr Bartal á øllum, uttan flest kappingarár á besta liðnum hjá okkum. Har er hann nr 2 við 17, ímeðan Ken Bærentsen hevur 20.
Metini, ið hann hevur við kappingarenda 2014, eru: Dystir í bestu deildini (274), mál í bestu deildini (54), dystir tilsamans (370), mál tilsamans (98), minuttir tilsamans (31695), gul kort (108) og reyð kort (9).
Skeyt avgerandi 3-1 málið móti Víkingi 23. oktober 2010, sum gav okkum evropeiska luttøku fyri fyrstu ferð. Málið var enntá skotið við vinstra beininum.
Spældi sín fyrsta dyst í bestu deildini í 1993 móti LIF. Meinhardt Dalbúð var venjari. Av leikarum á ÍF liðnum tá kunnu t.d. Tummas Arne Winthereig, André Magnussen, Odd Eliasen, Margar Hansen og Ólavur Ellingsgaard nevnast.

- Hevur leikt 6 A-landsdystir, 2 U19 og 4 U17 landsdystir. Av A-landsdystunum eru 3 sigrar, sum vóru móti Estlandi í 1997, Liktinstein í 2002 og Litava í 2009.
- Varð ársins ÍF'ari í 2014.
- Var á ársins Effo-liði í 2012.
- Er útbúgvin lærari.
- Spældi við GÍ 1999-2003.
- Er nummar 76, av tí at hann er føddur í 1976.
- Er elsti maður í hópinum, men einans við 6 døgum í mun til Sjúrð Jacobsen.




Tryggja tær
HÚS & HEIM



Trygdarpakki við eldsløkkjara, Brandteppi & tveimum tráðleysum roykvarnarum
Prísur: 995 kr

Ein TRYGG rýmingarleið



Í húsum við fleiri hæddum sova vit ofta á loftinum. Kyknar eldur, kann tað gerast ógjørligt at flýggja.
Í slíkum førum er tann kollveltandi MODUM brandstigin ein trygg loysn og samstundis tín einasti útvegur.

Hann er heftur uttan á húsini og nærum ósjónligur, tá ið hann er lagdur saman. Í neyðstøðu verður hann lættliga latin upp, so tú skjótt og trygt kanst ganga niður.

Fæst í øllum longdum. Vit átaka okkum uppseting.

Fønix
Mykinesgøta 8 - 100 Tórshavn - Tel +298 311909

Salong Halda.fo
Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:
Mánadag 9.00 - 17.00
Týsdag 9.00 - 19.00
Mikudag 9.00 - 19.00
Hósdag 9.00 - 18.00
Fríggjadag 9.00 - 17.00
Leygardag 9.00 - 13.00
Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo

teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo
Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo
510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo

Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

Krana- & lastvognskoyring
Maskinur & Amboð
v/ Poul Joensen
Tlf. 21 31 95
pouljo@olivant.fo
Svarar alt døgnið



BANKNORDIK
NordikPENSJÓN
Alt, sum tín pensjón eigur at vera
› www.banknordik.fo/pensjon



j+h BETONG
✆ 22 20 15

SANDGREVSTUR
1949



Bakkavegur 32 • FO-530 Fuglafjørður • Faroe Islands
Phone +298 445000 or +298 595900 • www.sandship.fo




Ung í Eik
www.eik.fo ung
Tel. 346000

Eik

**VØRUHÚSIÐ**

**TEL 54 25 00**

Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**




## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# Eiði og Fuglafjørður drúgva felags fótbóltssøgu

**Eiðismenn eru undangongumenn í Eysturoynni við fótbólti. Eiðs Bóltfelag er stovnað í 1913 sum Eide Fodboldklub**



*Grias er abbi til Jan og Ara Ellingsgaard. Aðrir eftirkomara, ið hava spælt við ÍF eru synirnir Haldor, Hanni og Ólavur, abbasynirnir Janus, Sverri, Grias (yngri) og Hilmar. Kristine Ellingsgaard eigur myndina*

Longu í 1916 vóru fuglfirðingar norðuri á Eiði og leiktu dyst. Men vøllurin var ikki so stórur. 35 favnar langur og einar 17 breiður. Partarnir samdust tí um at spæla við níggju monnum á hvørjum liði.

Felagið sovnaði so í nøkur ár. Og í 30unum byrjaði EB at kappast við Fuglafjørð, Leirvík og Gøtu. Tá EB í 1938 hevði 25 ára stovingardag, lótu elstu fótlbóltsspælararnir á Eiði teimum fýra bygdunum í Eysturoynni ferðasteyp at kappast um. Tað er hesin "pokalur", sum sungið verður um í gamla fylkissanginum hjá EB. Gøtumenn vunnu fyrsta árið, eiðismenn annað og triðja árið. Síðan frættist ikki meira um tað kappingina.

EB var við at stovna ÍSF í 1939 og luttók í fyrstu landskappingini fyri fótbólt í 1942. Ein av leikarunum hjá EB tá, var Gregorius (Grias) Ellingssgaard, sum segðist at verða ein av teim allar kringastu.

Tá í tíðini var tað so, at menninir vóru til skips um summari og tískil ikki lætt hjá smærru bygdunum at verða við í landskappingini.

Eiðismaðurin, Knút Vesturdal, var fyrst í hesum árinum gestur hjá Jógvan Arge í Meg minnist í útvarpinum (framúr áhugaverdar sendingar, av einasta sjómanni sum ikki bara reypaði um góðan fiskiskap og illveður - men heldur øvugt). Knút fortaldi um ein túr teir vóru á veg til fiskiskap í 1953 við Lambalíð. Einir fimm av manningini vóru fótbóltsleikarar og ólukku tíð skuldi teir av stað ein sunnudag, júst sum dystur skuldi verða í Fuglafirði. Teir fingu so avtalu við skiparin, um fyrst at spæla dyst í Fuglafirði og so beinleiðis til Runavíkar har skipið bíðaði eftir teimum. Men tá dysturin var leiktur, so vildu leikararnir sleppa í dans um kvøldið. Grias var byrjaður at fjasast í Fuglafirði við Judith, so hann mátti fáa dansin við. Teir fingu so onkran at billa skiparanum inn, at tað vóru ikki líkindi at fara av stað tað kvøldið og teir møttu ikki umborð fyrr enn morgunin eftir dansin.

Grias segðist at verða úrmælingur og millum allarbestu á Eiði tá – og bleiv mettur sum kubb at fáa til Fuglafjarðar at sparka, tá hann giftist higar.

EB kom ongantíð upp í fremstu deildina eftir at kappingin var skipað í deildir. Men eftir at teir løgdu felagið saman ella stovnaðu felagsliðið EB/Streym hevur søgan verið stolt – hæddarpunktini við Føroyameistaraheitunum í 2008 og 2012.

*Kelda: Meg minnist: Knút Vesturdal (2:5), KVF 2015 og Teir reystastu dreingir í norðum - ein føroysk fótbóltssøga (1892-1959) bind 1, Suni Merkistein 2010*




















ASKUR eitur nýggja limaskipanin hjá ÍSF, sum alt fleiri feløg nú brúka. ÍF hevur nú knýtt seg upp í skipanina, og hetta merkir, at allir limir skulu gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap umvegis nýggju skipanina á hesi síðuni.

Nýggja skipanin hjá ÍSF hevur til endamáls at skráseta øll ítróttafólk í Føroyum, og tá spælarar í ÍF gjalda limagjaldið og/ella skráseta limaskapin her, eru teir samstundis skrásettir sum íðkandi undir ÍSF – og sjálvandi eisini sum limir í ÍF.

Við nýggju skipanini verður ikki longur møguligt at gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap við vanligari flyting umvegis bankan. Nógv umsiting hevur verið av tí, og nú øll gjøld fara um nýggju skipanina, lættir tað munandi um hjá felagnum umsitingarliga.

Vónandi lættir nýggja skipanin eisini um hjá foreldrum og spælarum, sum skjótt og lætt kunnu gjalda limagjøldini og skráseta limaskapirnar her. Felagið heitir á øll um at gjalda limagjald og skráseta limaskap nú! Tá limagjaldið er goldið, og limaskapurin skrásettur, er spælarin eisini limur í tryggingarskipanini hjá ÍSF.

Sí meira á www.if.fo

# HAGTØL

**FAROE SHIP**

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 8/7/15 | KÍ - HB |
| 8/9/15 | FC Suðuroy - TB |
| 8/9/15 | B36 - NSÍ |
| **8/9/15** | **ÍF - EB/Streymur** |
| 8/9/15 | AB - Víkingur |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 8/16/15 | TB - KÍ |
| 8/16/15 | EBS - B36 |
| 8/16/15 | HB - AB |
| 8/16/15 | NSÍ - FCS |
| **8/16/15** | **Víkingur - ÍF** |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Nr Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Klæmint A. Olsen | 18 | NSÍ |
| Finnur Justinussen | 13 | Vík |
| Andreas Lava Olsen | 11 | Vík |
| Albert Adu | 9 | TB |
| Lukasz Cieslewicz | 8 | B36 |
| Pól Jóhannus Justinussen | 8 | NSÍ |
| Hans Pauli Samuelsen | 7 | B36 |
| Arnbjørn T. Hansen | 7 | HB |
| Jógvan Andrias S. Nolsøe | 7 | AB |
| Heðin Klakstein | 7 | KÍ |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | LK | SK | Tils. |
|---|---|---|---|
| Clayton Soares | 5 | 1 | 6 |
| Adeshina A. Lawal | 5 | | 5 |
| Kristoffur Jakobsen | 2 | 2 | 4 |
| Andy Ó. Olsen | 3 | 1 | 4 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 2 | 1 | 3 |
| Bartal Eliasen | 2 | 1 | 3 |
| Dánjal á Lakjuni | 2 | 1 | 3 |
| Leivur Joensen | 2 | | 2 |
| Nenad Saric | 1 | 1 | 2 |
| Karl A. Løkin | 2 | | 2 |
| Áki Petersen | 1 | | 1 |
| Fritleif í Lambanum | 1 | | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 19 | 12 | 6 | 1 | 41 | 18 | 23 | 42 |
| 2 | NSÍ | 19 | 12 | 4 | 3 | 54 | 27 | 27 | 40 |
| 3 | Víkingur | 19 | 10 | 7 | 2 | 52 | 26 | 26 | 37 |
| 4 | HB | 19 | 8 | 8 | 3 | 27 | 21 | 6 | 32 |
| 5 | KÍ | 19 | 7 | 6 | 6 | 34 | 30 | 4 | 27 |
| 6 | TB | 19 | 4 | 9 | 6 | 27 | 32 | -5 | 21 |
| **7** | **ÍF** | **19** | **4** | **8** | **7** | **29** | **37** | **-8** | **20** |
| 8 | FC Suðuroy | 19 | 4 | 3 | 12 | 24 | 47 | -23 | 15 |
| 9 | AB | 19 | 1 | 9 | 9 | 21 | 32 | -11 | 12 |
| 10 | EB Streymur | 19 | 1 | 4 | 14 | 18 | 57 | -39 | 7 |



# Vit eiga nøkur bein á mótstøðuliðinum

**Í hesum teigi royna vit at finna fram teir á dagsins mótstøðuliðið, sum eru ættaðir úr Fuglafirði**



Mynd: Sigmar Mørkøre

Arnar Dam er hálvur fuglfirðingur. Arnar er sonur Jákup Dam og Gunnvá hjá Annu og Petur Larsen. Kollfirðngurin spældi okkurt árið við ÍF saman við øðrum kollfirðingum um smádreingjaaldur. Í 2008 leikti Arnar fýra dystir fyri 2. Deild hjá ÍF og gjørdi fýra mál.

Liðini í dag:

# ÍF – EB Streymur

| | |
|---|---|
| 1 | Hallgrím G. Hansen (M) |
| 2 | Áki Petersen |
| 3 | Poul N. Mikkelsen |
| 4 | Sjúrður Jacobsen |
| 5 | Fritleif í Lambanum (L) |
| 6 | Margeir Toftegaard |
| 7 | Dánjal á Lakjuni |
| 8 | Bogi Reinert-Petersen |
| 9 | Kristoffur Jakobsen |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard |
| 11 | Frank H. Poulsen |
| 15 | Jákup Oluf á Lakjuni |
| 16 | Karl A. Løkin |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento |
| 19 | Levi Jøkladal |
| 20 | Leivur Joensen |
| 21 | Andrias Poulsen |
| 22 | Nenad Saric |
| 23 | Andy Ó. Olsen |
| 24 | Dánjal Pauli Højgaard |
| 25 | John Daniel Guðjónsson |
| 28 | Arnold Kristiansen |
| 30 | Adeshina A. Lawal |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard |
| 38 | Predrag Markovic (M) |
| 76 | Bartal Eliasen |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Aleksandar Jovevic |
| Hjálparvenjari: | Poul Ennigarð |
| Hjálparvenjari: | Eyðun Ryggshamar |
| Hjálparvenjari: | Nunu Ánike |
| Liðleiðaraábyrgd: | Dan Petersen |

| | |
|---|---|
| 2 | Andras Olsen |
| 3 | Árni G. Olsen |
| 5 | Marni Djurhuus |
| 6 | Andru Poulsen |
| 7 | Jónstein Magnussen |
| 13 | Ragnar B. Danielsen |
| 14 | Rógvi E. Nielsen |
| 15 | Hanus Olsen |
| 16 | Jan á Høgaryggi |
| 17 | Niels Pauli B. Danielsen (L) |
| 18 | Brian Olsen |
| 19 | Arnar Dam |
| 20 | Jóhannes Hansen |
| 21 | Ólavur F. H. Ejdesgaard |
| 23 | Leif Niclasen |
| 24 | Jákup Andrias Hansen (M) |
| 25 | Rói H. Olsen |
| 26 | Egil á Bø |
| 28 | Tóki H. Johannesen |
| 29 | Eyðstein Zachariassen |
| 30 | Símun Jóhan Wolles (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Eliesar Olsen |
| Hj. Venjari: | Teitur Joensen |
| Liðleiðari: | Hans Jákup Johansen |
| Liðleiðari: | Dánjal Magnussen |
| Liðleiðari: | Esmar Eiðisgarð |

**Dómari:** Kári J. á Høvdanum
**Hjálpardómarar:** Edvard Højgaard og Jóannes Mikkelsen
**4. dómari:** Petur Reinert
**Eygleiðari:** Jónfinn